# Í STØRRI FLOKKI



*Hinir næmingarnir í flokkinum rokna Døgg fyri at vera javnbjóðis lim við hini í flokkinum*

**Hinir næmingarnir eru við uppá, at vit skulu bíða við tiltøkum, til tá ið Døgg er her, sigur**

FLOKSLÆRARIN BRYNHILD KAMBAN



*Brynhild Kamban, flokslærari, dámar væl skipanina, at næmingar í útoyggj eru knýttir at einum størri skúla*

ein av teimum fremstu næmingunum í fiólspæli.

Tá ið Døgg er í Dímun, hevur hon ongan tónleikarlærara har. Men ráð eru fyri tí. Eins og skúli hava tey í Dímun skype, og Angelika undirvísir Døgg um skype.

– Tað er ein stór avbjóðing fyri meg sum lærara at undirvísa upp á henda mátan, men tað riggar, sigur Angelika Nielsen.

Tó ber ikki so væl til við samspæli yvir skype, tí ljóðið er eitt sindur seinkað

– Hesi børnini eru ikki øðrvísi enn onnur børn. Tað krevur ikki nakað serligt tónleikaroyra, men við nógvari venjing kunnu øll læra at spæla, og tey verða stimbrað við tónleiki, sigur hon.



*Í Havn kann hon spæla saman við hinum*